# Psykiatrisk verkætlan

## - Sálarsjúk í arbeiði innan psykiatriina

**Hevur tú verið sálarliga sjúk/ur?**
Og kundi tú hugsað tær at verið við til at skapt størri opinleika um sálarliga sjúku í Føroyum við at brúkt títt sjúkuinnlit at hjálpt øðrum - og samstundis fingið útbúgving?

Psykiatriski depilin fer nú undir spennandi SB-verkætlan. (SB stendur fyri starvsfólk v/brúkarafortreytum). **Pláss er fyri uml. 10 fólkum**, ið hava kent sálarliga sjúku á egnan kropp. Hesi fara alt komandi ár, í róligum og tryggum umhvørvi at luttaka í viðkomandi, teoretiskari frálæru. Samstundis koma tey í hóskandi starvsvenjing.

Ætlanin við verkætlanini, sum hevur givið sera góð úrslit í øðrum londum er, at menna fyrrverandi sálarlig sjúk til at kunna virkað í t.d. einum starvsfólkabólki á eini psyk.deild. Har kunnu tey umboða sjúklingarnar út frá tí veruleika, at ongin kann skilja t.d. kenslur hjá einum sálarliga sjúkum betur enn ein, ið sjálv/ur hevur verið sjúkur

Fyrimunirnir við starvsfólkum við brúkarafortreytum eru nógvir. Ikki bara kunnu hesi "tosa sama mál" sum tey sjúku, men tey kunnu eisini vera livandi dømi hjá teimum og teirra avvarðandi um, at tað ber væl til at koma styrkt uppundan aftur.

Heldur tú hetta ljóðar áhugavert, so er ikki at halda teg aftur! Send okkum "nakrar reglur", har tú greiðir frá, hvussu júst tínar dygdir kundu verið nýttar í einari starvsvenjing innan psykiatriska økið.

Umsókn, har tú skrivar um teg, tína sjúku og tankar um nýggja starvið, kanst tú senda til:

**Landssjúkrahúsið**
Psykiatriski Depilin
SB Verkætlanin
Att.: Bergtóra Høgnadóttir Joensen
Fo 100 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er mánadagin 2. januar 2006.

Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við Bergtóru, samskipara og Fíu, SB-ara á tlf. 304500 lok. 4161 ella teldupost bhj@lsh.fo




stanley samuelsen

**Nýggj fløga "Sól og Regn" er í handlunum.**
Konsertir:
Mikudagin 14. desember kl. 20.00 í Miðlahúsinum í Vágsbotni
Hósdagin 15. desember kl. 20.00 í Mentanarhúsinum í Fuglafirði
Fríggjadagin 16. desember kl. 20.30 í Fjørukrónni í Vestmanna

Stuðlað av Sansir, SPEKT og Kall

# Søkt verður eftir skrivara

Søkt verður eftir parttíðarskrivara til ELNEVNDINA at byrja tann 1. janaur 2006.

Starvið umfatar at taka sær av dagliga virkseminum hjá nevndini, harundir málsviðgerð, at fyrireika fundir og annað arbeiði, sum er fevnt av arbeiðsøki hjá ELNEVNDINI.

Skrivarin skal hava eltøkniligan førleika.

Løn samb. avtalu.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til ELNEVNDINA, Reynagøta 24, Postboks 252, 110 Tórshavn og umsóknirnar skulu vera latnar inn í seinasta lagi tann 12. desember 2005.

Gjøllari upplýsingar fáast frá ELNEVNDINI á tlf. 354000 ella fartelefon 224002.

**ELNEVNDIN**

ELNEVNDIN er stovnur undir vinnumálaráðnum, sum er sett sbrt. løgtingslóg um sterkstreymsútbúnað. Arbeiðsøkið hjá nevndini eru tey verkevni, sum standast av løgtingslóg um sterkstreymsútbúnað og løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarum við tilhoyrandi kunngerðum, harundir at hava eftirlit við rakstri av sterkstreymsútbúnaðinum og við eltilfari hjá innflytarum, heilsølumonnum og sølubúðum v.m.

INPACT

**HÚS ELLA ÍBÚÐ**
**Í TÓRSHAVN/SUÐURSTREYMOY**
**YNSKIST TIL LEIGU**

Fyri ein av okkara kundum sóknast vit eftir einum húsum ella eini íbúð í Tórshavn ella í Suðurstreymoy.

Húsið/íbúðin skal nýtast sum bústaður hjá stjóranum og familjuni.

Tað er ein fyrimunur, um bústaðurin liggur væl fyri og hevur gott útsýni, tí tað er ein partur av arbeiðnum hjá stjóranum at hava smáar samkomur í heimligum umhvørvi.

Tey, ið hava áhuga fyri at leiga slíkan bústað út, kunnu venda sær til Jógvan Amonsson.

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***
**R.C. Effersøesgøta 26**
**Postrúm 191**
**110 Tórshavn**

**Member of international network of professional accountants**

Sosialurin

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 4092**
**Navn:** Sp/f Íblástur
**Adressa:** Slættalíð 5 100 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar
**Stovningardato:** 23-11-2005
**Viðtøkudato:** 23-11-2005
**Stovnarar:** Sp/f 2441, Sp/f Heimlon , 110 Tórshavn
**Stjórn:** Mads Andrias Winther, Slættalíð 5, 110 Tórshavn, (stjóri)
**Grannskoðari:** P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 110 Tórshavn
**Partapeningur:** kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil og annað starv í hesum sambandi.
**Roknskaparár:** 01.01 - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 23.11.2005 - 31.12.2006

*Skráseting Føroya tann 29. november 2005*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 4096**
**Navn:** Sp/f Forlagið Hellurnar
**Adressa:** Ovaragøta 1 188 Hoyvík
**Kommuna:** Tórshavnar
**Stovningardato:** 22-11-2005
**Viðtøkudato:** 22-11-2005
**Stovnarar:** Jústinus Mannbjørn Leivsson Ejdesgaard, Ovaragøta 1, 188 Hoyvík
**Stjórn:** Jústinus Mannbjørn Leivsson Ejdesgaard, Ovaragøta 1, 188 Hoyvík, (stjóri)
**Grannskoðari:** Sp/f Agnar á Dul, Gerðagøta 31, Boks 15, 700 Klaksvík
**Partapeningur:** kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka freelancejournalistik, útgávuvirksemi og annað í hesum sambandi.
**Roknskaparár:** 01.01 - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 22.11.2005 - 31.12.2006

*Skráseting Føroya tann 05. desember 2005*

*Kristin Balle*